**GAMLI KIRKJUGARÐUR Í HAVN SUM SØGUBÓK: Sosialurin fer undir nýggjan tátt, har vit taka myndir av einstøkum gravsteinum, og gera ein lýsing av persóninum í grøvini. Fyrsta greinin verður um Heina Heinesen, beiggja William, sum doyði í Vancouver í Canada, men sum pápin Zacharias fór yvir eftir og fekk jarðaðan í Havn**



*Til høgru bringumynd av Heina Heinesen, bróðir William Heinesen, sum doyði í Kanada, men er grivin í Havn*




# Systkin avrættað fyri blóðskemd

**Eitt av teimum mest áhugaverdu plássum í Havn er gamli kirkjugarður á Svínaryggi mitt í býnum. Í fyrstu grøvini liggur dótturin hjá tveimum systkjum, sum í 1706 vórðu avrættaði fyri blóðskemd**



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo
MYNDIR:
Álvur Haraldsen

Gamli kirkjugarðurin við Dr. Jakobsensgøtu í Havn varð nýttur fram til 1935, tá ið »nýggi« kirkjugarður við Velbastaðvegin varð tikin í brúk. Tó eru nøkur fólk grivin her í nýggjari tíð. Hesi eru í stóran mun hjúnarfelagar hjá teimum, ið lógu har frammanundan.

Kirkjugarðurion á Svínaryggi, sum hann er róptur, verður onkuntíð umrøddur, og hetta er tá merkisdagar er fyri onkran, sum liggur grivin her. Nú um dagarnar var tað í samband við, at 150 ár vóru liðin, síðan Rasmus Effersøe varð føddur, og í hesum sambandi vóru kransar lagdir á grøvina hjá honum, og hetta gav eisini høvi til umrøðu í fjølmiðlunum. Tað er eisini sera gott, at vit hava eitt stað, sum vit kunnu seta í samband við fólk, sum hava havt stóran týdning í samfelagnum.

Í veruleikanum er gamli kirkjugarður ein heil søgubók fyri Havnina. Tá gingið verður runt í kirkjugarðinum, verður komið fram á ein hóp av gravsteinum við nøvnum á meira ella minni kendum havnarborgarum, og nógvir av teimum hava eisini í ein stóran mun merkt alt føroyska samfelagið.

Á eini vitjan í kirkjugarðinum hittu vit Helga í Brekkunum, sum vegna býráðið røkir kirkjugarðin sum ein part av sínum virksemi.

Hetta hevur eisini verið sera tiltrongt, tí fyri bert fáum árum síðani tyktist hann at vera sera misrøktur.

Helgi er hegnismaður, og tað sæst eisini. Gøtan millum gravirnar er grúsað, og tað er snøggað væl nógva staðni.

### Foreldur hálshøgd

Helgi veit eisini væl um søguna hjá kirkjugarðinum. Kirkjugarðurin stavar frá 1782, tá ið kirkjugarðurin kring kirkjuna gjørdist ov lítil. Tað sigst, at fyrsta fólkið, sum varð jarðað, var »kona Jákup Hansen« og var hetta 21. mai 1782. Hon var dóttir Skælingssystkini, og hon var fødd í 1704. Foreldrini, Marin Joensdatter og Hendrik Joenssøn, vóru í 1706 avrættað fyri blóðskemd. Tey vóru hálvsystkin og høvdu fingið eitt barn saman. Systkini játtaðu seg sek og bóðu til fánýtis kong um náði. Tey vóru tey seinastu í Føroyum, sum vórðu avrættað.

Tey eru eisini seinni jarðað í gamla kirkjugarði. Helgi veit at siga frá verfaðir sínum Trygva Restorff, at tá ið molin varð longdur í 1928, komu teir fram á tvær beinagrindir við skansan, har skøltarnir lógu millum knøini. Hetta varð gjørt við slík, sum vórðu hálshøgd. Eisini fyri at forða teimum at ganga aftur! Tey vórðu síðan jarðað í gamla kirkjugarðinum.

### Yvir 200 ár

Elsti gravsteinur, sum vitað er um, er frá 1788, og er hetta kona John Michael Quilling, sum arbeiddi sum bøkjari hjá Ryberg keypmanni, og sum vit kenna frá Quillingsgarði. Quilling hevði havnardreingir í bøkjaralæru, og hann arbeiddi annars eisini fyri Ryberg á oynni Man.

Ein annar av teimum